

Familjan njótar ein góðan summardag í túninum uttan fyri nýggju húsini tætt við strondina í Eysturjútlandi. Frá vinstru Kartin L. Hansen, Sigrid Sighvatsson og trý ára gamla Sarah Sighvatsson Hansen

»Ein urtagarður uttan blomstur er ongin urtagarður. Eitt hús uttan børn er ikki eitt hús við lívi í«.



Sigrid Sighvatsson og Kartin L. Hansen hava nýliga bygt sær snotulig hús í Hou við Odder sunnanfyri Århus

vísa, at nógv børn, sum hava verið lutfalsliga gomul, tá tey eru komin, hava klárað seg væl, meðan onnur smærri børn hava havt tað verri, so har er ongin meginregla at halda seg til, sigur Kartin Leitisstein Hansen.

## Fingið tvær skurðviðgerðir

Spurd um hvussu tíðin hevur verið síðani tey fingu dóttrina úr India, sigur Sigrid Sighvatsson.

– Tíðin hevur gingið skjótt, men tað hevur verið ræettiliga intenst, og man lærir nógv. Ikki minst um seg sjálvan. Tú verður noyddur at lesa hendan lítla persónin av, seta orð á alt yvirfyri barninum, tí tað er so mikið gamalt, tá tað kemur. Hví reagerar hon soleiðis nú, hví er hon kedd ella glað og so víðari, sigur Sigrid Sighvatsson og vísir á týdningin av at vera ein góð fyrimynd.

– Vit síggja, hvussu skjótt hon tekur upp eftir okkum og ger tað sama sum vit. Tí ert tú sum foreldur noyddur at siga klárt nei, tá tú meinar nei ella øvugt. Tað er ikki altíð lætt við eini gentu, sum er so viljasterk og veit, hvat hon vil.

At ættleiða børn er ikki nakað, sum fólk fáa loyvi til av sær sjálvum. Umsøkjarar til ættleiðing skulu nærmst vigast á eini gullvekt, áðrenn tey fáa loyvi til tað. Hetta heldur Sigrid Sighvatsson vera í fínasta lagi.

– At fáa eitt barn við eini barlast er ikki tað sama, sum at fáa eitt biologiskt barn, ið tú sjálv hevur borið. Hetta krevur eina vitan, sum tú fært á foreldraskeiðum. Eisini krevur tað, at tú kennir teg sjálvan og hvønn annan, tí tað eru nógvar støður, har tú kanst gerast fullkomiliga ørkymlaður.

Sarah er ein sera kvikk og vælvirkandi genta, sum tó hevur havt onkrar likamsligar trupulleikar. Av tí sama er hon tvær ferðir løgd undir skurð fyri bruna í arminum og beininum. Hesir skavankirnir eru nú ræettaðir, og Sarah er frísk og farin at ganga í barnagarði eins og flestu javnaldrar hennara.

Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo



Húsini hjá familjuni Sighvatsson og Hansen eru bæði ljós og hugnalig